# Kjak



**Jon Hestoy**
*Formaður, Svimjisamband Føroya*

# Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga

Suðuroyingar taka í hesum døgum megnartak. Privatur felagsskapur hevur við stuðli úr allari Suðuroynni tikið seg saman at byggja fyrsta langhylin í Føroyum. Henda verkætlan er serstøk, ikki bara fyri Føroyar, men man vera eitt eindømi í øllum førum um okkara leiðir. Við nýhugsan innan bygging og orku hevur felagsskapurin staðið klárur at seta spakan í alt 2011.

## Spillandi tungan

Tað fyrikemur okkum, ið varða av svimjingini ikki sørt ørkymlandi, at løgtingsmaðurin Helgi Abrahamsen skal fara fram á Løgtingsins røðarapalli og skíra tey, ið standa aftan fyri hesa ætlan fyri »bóndafangarar«! Og hetta er ikki fyrstu ferð, at løgtingsmaðurin er frammi í somu ørindum. Herfyri var hann í bløðunum, har hann royndi at sáa iva um, um henda verkætlanin nú var grundað á veruleikan.

Eisini hevur verið roynt at fáa inn í orðaskiftið, um hesin langhylur nú liggur rætta stað, um tað ikki var betri at hann lá í Havn, í Sundalagnum ella í Eysturoynni. Her skal eg minna bæði løgtingslimin og øll onnur á, at seinasti hylurin í kappingarstødd, varð tikin í nýtslu í desember 1982. Í hesi skjótt farnu 30 árini, hevur eingin, eingin einstaklingur ella kommuna arbeitt seriøst við ætlanum um at byggja nýggjan svimjihyl.

Eftir Evropeiska silvurmerkið hjá Páli Joensen í Budapest í 2010, var borgarstjórin í Fuglafirði frammi og bjóðaði eitt øki á Kambsdali. Formaðurin í Mentanarnevndini í Tórshavnar býráð tosaði um, at tíðin var komin til at byggja nýggjan hyl í Tórshavnar kommunu, men honum á baki kom borgarstjórin og avnoktaði, at nøkur bygging av svimjihyli lá í kortunum í Tórshavnar kommunu. Í 2008 var borgarstjórin í Runavíkar kommunu í Degi & Viku, har boðað var frá at eingin onnur størri íløga varð gjørd í kommununi enn nýggi skúlin. Mær kunnugt einasta kommunan, sum veruliga hevur arbeitt miðvíst við at betra svimjiviðurskiftini, er Klaksvíkar kommuna, har endurnýggjanin av svimjihøllini er í gongd og áhugaverdar ætlanir eru fyri framman.

## Bøtandi hondin

Tað skal eingin ivi vera um, at fyri okkum í varða av føroyskari svimjing, so er tað stak hugaligt at síggja at allar góðar kreftur í Suðuroynni eru farnar saman um at byggja 50-metra langhyl í oynni. Ikki til ein mann, sum ofta verður ført fram, men til eitt svimjifelag í stórum blóma, kanska fyrsta ítróttarfelag í Føroyum við veruligum altjóða ambitiónum. Eins og tað eingin ivi er um, at nýggi hylurin í Suðuroynni fer at koma allari føroyskari svimjing til góðar. Tað hevði verið meira sámuligt um vit øll bakkaðu hesa stórslignu ætlan upp, heldur enn at royna at sáa iva, um hetta nú í veruleikanum er ein ætlan, ið kann gjøgnumførast.

At ætlanin skal standa og bíða eftir einari almennari játtan uppá 4 milliónir krónur, er sera hugstoytandi, vónandi verður hetta mál avgreitt í løgtinginum sum skjótast.

Fyri okkum í føroyskari svimjing er hetta ein megnarætlan, og fær hon mín fulla stuðul. Vónandi verður hetta tann fyrsti langhylurin í eini røð av fleiri.

---

Okkara góða mamma, vermamma,
omma og langomma

**Sanna Dahl Niclasen**
**Tórshavn**
**ættað úr Vági**

andaðist 28. februar, 95 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
fríggjadagin kl. 13.00.

**Jógvan, Andrass og Helena**
**við familjum.**

Tey, ið vilja minnast Sannu, kunnu lata
Føroyafelag móti Krabbameini eina gávu.

---

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at
góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Brynjólvur Petersen**
**ættaður úr Sandavági**
**búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin 1. mars, 75 ára gamal.

Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum
hósdagin kl. 19.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin kl. 15.00.

***Familjunnar vegna***
**Sólbjørg**

Tey, sum vilja minnast Brynjólv, kunnu lata ungdómsdeildini
hjá HB eina gávu, konta í peningastovnunum.

---

## TØKK

Tøkk til tykkum øll, sum sýndu samkenslu og
veittu hjálp, tá kæra kona mín

**Dorthea Kristoffersen**
**Vestmanna**

andaðist og varð jarðað.

**Steingrím Kristoffersen**

---

## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði
maður, pápi, verpápi, abbi, og langabbi okkara

**Jens Pauli ( Boy ) Joensen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prestarnar Magnus Brahe Jørgensen og
Niels Paula Danilsen fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, urguspælarar, sangarar og
annars tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara
síðsta hvíldarstað her á fold.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymsan hátt.
Ein serstøk tøkk til leiðslu og starvsfólk á Norðoya
Røktarheimi fyri góða røkt og umsorgan.

Tøkk fyri gávur til Christianskirkjuna.

***Familjunnar vegna***
**Fía, Olaf, Johan, John Sigurd og Birgir**